## Ov mong doyggja í ferðsluni



Hóast bæði felags og einsæris átøk doyðu umleið 39.000 fólk í ferðsluni í ES-londunum í fjør, og tað var langt oman fyri tað málið, sum londini høvdu sett sær. Í einari nýggjari frágreiðing, sum er løgd fram í dag, stendur, at tey 27 londini hava sett sær sum mál, at næsta ár skal ferðslan ikki krevja meiri enn í mesta lagi 27.000 mannalív. Sagt verður, at tey seinastu átta árini er talið á teimum, sum hava latið lív í ferðsluni, minkað 4,4 prosent í meðal um árið, men at talið skal minka 7,4 prosent árliga, um samveldið skal røkka sínum máli. Sambært teirri nýggju frágreiðingini hava Malta, Svøríki, Niðurlond og Bretland teir tryggastu vegirnar.

## Fleiri hermenn í rúsevnakríggj

Í Meksiko herðir stjórnin bardagan ímóti rúsevnaharkaliðunum og hevur sent 1.500 hermenn afturat til býin Cindad Juarez. Býurin er tætt við amerikanska markið og er vorðin miðdepil í bardaganum millum mnyndugleikarnar og rúsevnaharkaliðini. Í mars sendi stjórnin 5.000 hermenn til býin, og tað eydnaðist teimum at fáa tamarhald á støðuni. Men nú er ófriðurin kyknaður aftur, og í seinastuni hava átta fólk latið lív í meðal um dagin. Blaðið El Universal skrivar, at í fjør vórðu meiri enn 1.600 fólk myrd í Cindad Juarez, og at talið er longu komið upp á 1.500 higartil í ár.

# Løgmaður og Hans Pauli Strøm framdu lógarbrot

**Tað var lógarbrot, tá ið Hans Pauli Strøm brúkti 170 milliónir meiri á fíggjarlógini enn Løgtingið hevði játtað honum og tað var lógarbrot, tá ið løgmaður ikki steðgaði honum. Tað sigur Landsstýrismálanevndin, sum fer at lata málið upp í hendurnar á Løgtinginum at taka støðu til**

MEIRNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

**Yvirtrekk 2005-2008 fyri fíggjarlógina íalt og §8**

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2005-2008 íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Yvirtrekk á §8 | -17,647 | -23,328 | -65,365 | -62,440 | -168,780 |
| Yvirtrekk á øðrum greinum | -22,792 | -25,045 | -56,702 | -62,675 | -167,214 |
| Yvirtrekk á fíggjarlógini íalt | -40,439 | -48,373 | -122,067 | -125,115 | -335,994 |
| Pct. Meirnýtsla á §8 | 44% | 48% | 54% | 50% | 50% |
| Játtan á § 8 | 1,940,591 | 1,988,820 | 2,064,802 | 2,269,584 | 8,263,797 |
| Játtan á øðrum greinum | 1,711,677 | 1,850,413 | 2,005,894 | 2,149,676 | 7,717,660 |
| Játtan á fíggjarlógini íalt | 3,652,268 | 3,839,233 | 4,070,696 | 4,419,260 | 15,981,457 |
| Pct. Játtan á §8 | 53% | 52% | 51% | 51% | 52% |
| | | | | | |
| Pct. Yvirtrekk á §8 í mun til játtan á §8 | -0.9% | -1.2% | -3.2% | -2.8% | -2.0% |
| Pct. Yvirtrekk á øðrum greinum í mun til játtan fyri aðrar greinar | -1.3% | -1.4% | -2.8% | -2.9% | -2.2% |

*Hetta er ein talva, sum Heilsumálaráðið hevur gjørt um meirnýtslu hjá landsstýrinum frá 2005-2008. Niðurstøðan er, at hjá almanna- og heilsumálaráðnum var meirnýtslan lutfalsliga minni enn hjá øðrum aðalráðum. Frá 2005-2008 var meirnýtslan á allari fíggjarlógini tilsamans 336 milliónir krónur. Av hesum var meirnýtslan hjá almanna- og heilsumálaráðnum 168 millónir krónur og meirnýtslan hjá øðrum aðalráðnum var 167 milliónir. Hetta merkir at almanna- og heilsumálaráðið hevði 50% av tí samlaðu meirnnýtsluni á fíggjarlógini. Í sama tíðarskeiði hevur játtanin hjá almanna- og heilsumálaráðnum ligið um 52% av samlaðu fíggjarlógini. Eftir játtanini var meirnýtslan hjá almanna- og heilsumálaránum verið lægri í prosentum enn meirnýtslanin hjá hinum aðalráðunum. Fyri tíðarskeiðið 2005-2008 hevur meirnýtslan hjá almanna- og heilsumálaráðnum verið 2,0%, men hjá hinum aðalráðunum var meirnýtslan íalt 2,2% av játtanini*

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, hevur brotið lógina.

Tað niðurstøðuna er landsstýrismálanevndin hjá Løgtinginum fyribils komin til.

Árini frá 2005-2008 brúkti hann heilar 170 milliónir krónur meiri til heilsuverkið og almannamálini, enn Løgtingið hevði játtað honum á fíggjarlógini.

Men landsstýrismálanevndin heldur eisini, at Jóannes Eidesgaard, sum var løgmaður, og Kaj Leo Johannesen, sum er løgmaður, hava brotið lógina, tí teir ikki steðgaðu meirnýtsluni hjá Hans Paula Strøm.

Løgmaður hevur eftirlit við at landsstýrisfólk umsita sítt málsøki á lógligan hátt, men hesa skylduna forsømdi løgmaður, tá ið tað kom til meirnýtsluna hjá Hans Paula Strøm.

### 170 milliónir

Tað var tingmanningin hjá Tjóðveldinum, sum herfyri klagaði Hans Paula Strøm fyri landsstýrismálanevndini, sum hevur eftirlitið við landsstýrisfólkunum.

Tjóðveldið klagaði Hans Paula Strøm fyri at hava brúkt 170 milliónir krónur í heimildarloysi.

Tað merkir, at Hans Pauli Strøm hevur brúkt pengarnar, áðrenn Løgtingið hevur samtykt, at geva honum loyvi til tað, men aftan á hevur Løgtingið so samtykt nýtsluna.

Eftir at Landsstýrismálanevndin hevur kannað málið, er hon komin til ta niðurstøðu, at upplýsingarnir í kláguni eru rættir.

Og í eini fyribils niðurstøðu, staðfestir nevndin, at talan er um lógarbrot.

Men nevndin staðfestur, at tað er eisini lógarbrot, at løgmaður ikki steðgaði lógarbrotinum, tí hann hevur eftirlitið við landsstýrismálanevndini.

Fyribils Niðurstøðan er nú send pørtunum til hoyringar og tá ið teir hava svarað, verður ein endalig niðurstøða gjørd.

Tjóðveldið staðfestir í klagu síni, at við slíkari framferð er fíggjarlógin ikki verd tað pappír, hon er skrivað á.

### Als ikki nøktandi

Í sambandi við kláguna staðfestir Landsgrannskoðarin, at eftir stýrisskipanini ingin útreiðsla má verða goldin, fyrrenn Løgtingið hevur samtykt tað frammanundan.

Somuleiðis siga Løgtingsgrannskoðararnir, at tað eigur heldur ikki at koma fyri, at umbøn um eykajáttan verður løgd fyri Løgtingið so seint í árinum, at útreiðslurnar, sum eykajáttanin er ætlað til, longu eru hildnar.

# Hans Pauli Strøm hongdur út

**Landsstýrismaðurin skilir ikki, hví hann skal pilkast burtur úr rúgvuni og gerast til brotsmann av serliga grovum slagi.. Hann sigur, at veruleikin er, at øll landsstýrisfólkini hava brúkt meiri pening, enn Løgtingið hevur játtað teimum**

MEIRNÝTSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg skal ikki forvara, at eg havi brúkt meiri pening, enn løgtingið hevur játtað mær. Men eg skilji ikki, hví eg skal pilkast burtur úr rúgvuni.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, vísir als ikki aftur, at hann hevur brúkt meiri pening, enn Løgtingið hevur játtað honum.

Men hann følir seg eitt sindur hongdan út. Hann sigur, at so at siga øll landsstýrisfólkini hava brúkt ov nógv.

- Eg veit ikki, hví eg skal hongjast út, sum ein stórur brotsmaður, tá ið veruleikin er, at meirnýtsla hevur verið ein almennur trupulleiki í øllum landsstýrinum, sigur hann.

Hann sigur, at í almanna- og heilsumálaráðnum hevur meirnýtslan verið 2% av játtaðu upphæddini, men hjá hinum aðalráðunum hevur meirnýtslan verið 2,2% tilsamans.

Samstundis hevur almanna- og heilsumálaráðið umsitið 52% av fíggjarlógini og hini aðalráðini hava umsitið 48% av fíggjarlógini.

- Tí er upphæddin á almanna- og heilsumálaráðnum stór, men meirnýtslan hjá øðrum ráðum er størri.

- Vit hava 52% av játtanini og 50% av meirnýtsluni. Hini aðalráðini hava 48% av játtanini og 50% av meirnýtsluni og tí er hetta ikki ein serstakur trupulleiki fyri meg staðfestir hann.

Hann sigur, at hetta verður høvuðsinnihaldi í tí svari, hann fer at senda landsstýrismálanevndini.

Men fyri tað um onnur hava brúkt ov nógv, forsvarar tað so eisini, at tú brúkar meiri, enn tú hevur heimild til?

- Nei, eg verji ikki meirnýtslu, men tað er ein trupulleiki, sum er felags fyri øll landsstýrisfólkini og nú er alvorliga táttað í á hesum øki, tí nú hava vit fingið greið boð um, at meirnýtsla verður ikki góðtikin longur.

### Ov einfalt

Tað harmar hann eisini, at Landsgrannskoðarin ikki nevnir tað í síni meting av málinum, at talan er um ein vanligan trupulleika, men gevur tað fatan, at talan er um ein serligan trupulleika fyri almanna- og heilsumálaráðið.

*Skuldsetir tú Landsgrannskoðaran fyri at renna politisk ørindi?*

Nei, tað gera eg ikki men tann, sum lesir niðurstøðuna hjá landsgrannskoðaranum situr eftir við, at hetta er ein serligur trupulleiki fyri mítt málsøki og tað er tað ikki og tað er at gera málið ov einfalt.

Hans Pauli Strøm staðfestir, at skal misálit reisast á hann av hesum, skal misálit eisini reisast ímóti øllum øðrum landsstýrisfólkum.

Men tað verður so ein spurningur, sum Løgtingið má taka støðu til og sjálvur tekur hann ongar avleiðingar av støðuni.